Fleiri rásir - einki roks

Á TV3 hóskvøldið kl. 19.00

*Frumsýning:*

# Kontrakten med Don Ø (1)

KONTRAKTEN med DON Ø

Hvussu finnur ein tað rætta starvsfólkið til eitt leiðarastarv í Danmark? Og, hvat krevst fyri at fáa eitt tílíkt starv? Skal man sleikja fyri stjóranum? Ella eru sjálvsálit og áræði hóskandi eginleikar? Kann ein fara í barnagarðin eftir børnunum klokkan trý, ella er hetta eitt stórt mistak? Tv3 hevur í samstarvi við kenda danska vinnulívsmannin, nevndarformannin í F.C. København, Flemming Østergaard, kannað hvat, ið skal til fyri at fáa fatur á einum dugnaligum starvsleiðara. Tv3 fylgir neyvt við gongdini í úttøkuni av tí rætta til starvið sum undirstjóra á tí størsta undirhaldssamtakinum í Danmark, nevniliga PARKEN - Sport & Entertainment (PS&E). Samtakið stendur aftanfyri fótbóltsfelagið F.C. København. Hesari úttøku stendur Flemming Østergaard sjálvur fyri, og hann er eirindaleysur í síni søk. Í 13 vikur skulu átta umsøkjarar, hvør í sínum lagi, sannføra Flemming Østergaard um, at tey eru tann rætti ella rætta at seta í starv sum undirstjóra í PS&E. Hyggjarin er við í allari gongdini, bæði tá luttakarin skal loysa uppgávur sjálvur, og tá luttakararnir skulu virka í felag. Í hvørjari sending skulu luttakararnir bæði arbeiða á egnari hond og eisini saman við hvørjum øðrum. Allir luttakararnir eru við í øllum 13 sendingunum. Í hesi fyrstu sendingini av Kontrakten med Don Ø koma umsøkjararnir til ta fyrstu starvsviðtaluna. Men viðtalurnar ganga ikki sum væntað. Hetta er tí, at fleiri av umsøkjarunum hava hugsað meiri um fundin við Don Ø sjálvan, enn teir hava grundað yvir um teir sjálvir eru egnaðir til starvið...



*Hart verður stríðið um starvið - her eru teir átta umsøkjararnir*



*Flemming Østergaard, Don Ø, leitar eftir einum undirstjóra til PARKEN Sport & Entertainment. Og hann er eirindaleysur í sínum dómum*

# The Italian Job

Á Canal+Film í kvøld kl. 20.00:

Meistaratjóvurin Charlie Croker hevur fingið eitt framúr gott hugskot til eina gullverda ætlan. Saman við hjálparmonnum sínum, ið allir eru serfrøðingar innan bankarán, eydnast tað at ræna eina væl varda borg í Venedi, uttan nakran harðskap. Sama kvøld, við fonginum um hendi, svíkir tann eini hjálparmaðurin allar hinar. Steve (Eward Norton) tekur fram eina pistól og rýmir avstað við øllum gullinum. Eitt ár seinni finnur Charlie Steve aftur, hetta er í Los Angeles. Ránsmenninir úr Venedi verða nú aftur savnaðir av Charlie, og ein ætlan verður løgd - ein hevndarætlan. The Italian Job er ein endurgerð av bretska kultfilminum frá 1969. Tá hevði lítli bilurin av merkinum Mini Cooper ein heilt serligan leiklut og so er eisini í hesum nýggja filminum. Fleiri filmsløtur við nógvari ferð og bilum er í filminum, m.a. á Walk of Fame í Hollywood og á undirgrundarbreytini í Los Angeles.



*Eins og í upprunafilminum frá 1969 er nógv ferð og fleiri bilar í The Italian Job*



*The Italian Job, við Mark Wahlberg, Charlize Theron og Edward Norton*